## Pauli setti nýtt føroyskt met

Føroyskir svimjarar gera alla somlu tíðina so mikið stór framstig, at tað kemur til sjóndar við ymsum metum. Tann seinasti er Pauli Øssursson Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag, sum setti nýtt føroyskt met í 50 metra frísvimjing við tíðini 23,96 sekund, tá hann leygardagin svam í Vági. Metið ger somuleiðis, at hann hevur kvalifiserað seg til Oyggjaleikirnar í summar og kappingina um danska meistaraheitið, sum verður seinni í ár.



## Nú er bara Kostic eftir

Av teimum trimum, sum upprunaliga vóru um boðið at venja føroyska A-landsliðið í fótbólti, er bara Luka Kostic framvegis tøkur, tí hinir báðir hava tikið við øðrum venjarastørvum. Hetta er greitt, nú Flemming Serritslev hevur skrivað undir sáttmála, ið ger hann til U-21 landsliðsvenjara í Armenia. Frammanundan er Colin Calderwood, sum segðist vera á veg til Føroya fyri einum mánaði síðani, blivin knýttir at Newcastle.

# Jákup ikki hvør sum helst

**– Eg haldi ikki, at vit kunnu hava ein málmann, sum kanska er í heimsklassa, sitandi á bonkinum, sigur Heðin Askham, ið hevur valt Gunnar Nielsen fram um Jákup Mikkelsen at verja føroyska málið í Íslandi**



FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Sunnukvøldið bar Vágaportalurin tey tíðindi, at Jákup Mikkelsen – eftir 21 ár á landsliðnum – kendi seg »sparkaðan av landsliðnum«, nú setti landsliðsvenjarin, Heðin Askham, hevur sagt Jákupi, at hann ikki kom at byrja inni í vinardystinum ímóti Íslandi 22. mars.

– Eg vildi geva Jákupi »fair-play«, tí hann er ikki hvør sum helst í føroyskum fótbólti. Hevði eg tikið hann út, so skuldi eg eisini byrjað við honum í málinum, sigur Heðin Askham, sum í dag hevur almannakunngjørt hópin til Íslandsdystin – uttan Jákup Mikkelsen millum teir 18 úttiknu.

– Jákup hevur ikki upp á nakran máta spælt seg av, men eg haldi ikki, at vit kunnu hava ein málmann, sum kanska er í heimsklassa, sitandi á bonkinum, sum hevur verið ein stór orsøk til góðu úrslitini hjá U21-landsliðnum, sigur setti landsliðsvenjarin og sipar til Gunnar Nielsen, sum herfyri skrivaði undir sáttmála við enska Premier League-felagið, Manchester City.

Heðin Askham sigur, at hann ikki vil avskriva nakran í heimligu kappingini, men sambært Vágaportalin følir Jákup Mikkelsen seg avskrivaðan á landsliðnum, nú hann hevur fingið at vita, at hann ikki longur er fyrsta valið til málmansplássið.

– At tað fór at enda soleiðis, hevði eg nú ikki droymt um. Eg hevði hugsað um at spælt mín seinasta dyst á landsliðnum undir øðrum umstøðum, eitt slag av farvæl-dysti, men tað verður so av ongum, sigur hann við Vágaportalin, har hann eisini váttar, at hann ikki vildi fara til Íslands fyri at sita á bonkinum.




# Stór útskifting í hópinum

**Bara sjey av teimum, sum vóru við A-landsliðnum í Litava í fjørheyst, hava fingið afturval frá setta landsliðsvenjaranum til vinardystin ímóti Íslandi.**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Heðin Askham, sum er settur landsliðsvenjari til vinardystin ímóti Íslandi, sum verður í Kórinn-høllini á Kópavogi sunnudagin 22. mars, hevur í dag almannakunngjørt, hvørjir 18 spælararnir manna føroyska hópin til henda dystin.

Bara sjey av teimum, sum vóru við til síðsta landsdystin hjá Føroyum á útivølli ímóti Litava tann 15. oktober í fjør, hava fingið boð hesa ferð. Tá skal tó havast í huga, at útisetarnir eru bara tríggir í tali, tí hesa ferð er úttøkan fyrst og fremst gjørd í heimligu kappingini.

Hinvegin vóru fimm av úttiknu spælarunum við til síðsta dystin hjá U21-landsliðnum, sum var spældur í september í fjør, umframt at fleiri av hinum hava verið partur av U21-landsliðnum, sum Heðin Askham venur saman við Bill McLeod Jacobsen.

Av teimum 18 spælarunum eigur annars greipufelagið EB/Streymur ikki færri enn seks spælarar, og síðani kemur NSÍ við fýra spælarum (Jónas Þór Næs er framvegis skrásettur sum NSÍ-ari, blðm.), meðan HB og Víkingur hava hvør sínar tveir og KÍ ein.

Hóast dentur er lagdur á spælarar úr Vodafonedeildini, eru Gunnar Nielsen, Odmar Færø og Símun Samuelsen, sum frammanundan er í Íslandi, tiknir út sum einastu fótbóltsútisetar hesa ferð.

## Úttikni hópurin

| | |
|---|---|
| Fróði Benjaminsen | HB |
| Egil á Bø | EB/Streymur |
| Jóhan Troest Davidsen | NSÍ |
| Odmar Færø | Brøndby |
| Arnbjørn Hansen | EB/Streymur |
| Einar Hansen | NSÍ |
| Pauli Hansen | EB/Streymur |
| Levi Hanssen | EB/Streymur |
| Kristoffur Jakobsen | KÍ |
| Bogi Løkin | NSÍ |
| Christian Mouritsen | HB |
| Gudmund Nielsen | EB/Streymur |
| Gunnar Nielsen | Manchester City |
| Jónas Þór Næs | NSÍ |
| Andreas Lava Olsen | Víkingur |
| Súni Olsen | Víkingur |
| Símun Samuelsen | Keflavík |
| René Tórgarð | EB/Streymur |